


***Nr. 5*** ***5. mars 2017*** ***77. árg.***

# Arbeiði og hvíld

*Í seks dagar skalt tú verk títt vinna men hvíla á sjeynda degi.*
*2. Mós. 34,21.*

Tað var altargongd á røktarheiminum. Ein gomul dement kona leitaði í pengapunginum eftir einum mynti, tí hon vildi gjalda fyri altarbreyðið. Presturin fangaði støðuni beinanvegin og segði við hana: „Tað er goldið.“

Jesus hevur goldið, fyri at vit kunna fáa syndanna fyrigeving, og hevur soleiðis gjørt okkum sátt við Gud og tikið syndabyrðina av herðum okkara. Jesus hevur keypt okkum við sínum egna blóði, so at vit kunnu fylgjast við honum bæði í lívinum og í deyðanum. Onki vald, hvørki í himni ella á jørð, kann skilja okkum frá Guds kærleika í Jesusi Kristi.

Trúgvin á Guds kærleika fríar okkum frá at gerast trælir undir peningi ella øðrum menniskjum. Okkum er ikki tørvur á at savna okkum gripir her á jørð, tí vit hava longu ein grip í himlinum.

Tí kunnu vit hvíla, tá ið sunnudagurin kemur; dagurin, sum er ein Guds gáva til okkara. Tí Gud veit, at vit halda ikki til at arbeiða ein dagin fyri og annan eftir uttan hvíld. Vit kunnu hvíla í trúnni á, at vit longu eiga tað virðismesta í heiminum: Guds kærleika til okkara.

Uppgáva okkara er sostatt at liva kærleikan út millum teirra, sum vit liva ímillum. Tað kunnu vit gera á mangan hátt, eisini í vitnisburðinum um, at hvíludagurin er givin okkum til at takka Gudi.

Í trúnni fáa vit frímóð at vera partur í kirkjuliðinum, sum sunnudag eftir sunnudag kemur saman at lovsyngja Gudi og fáa lut í Jesu likami og blóði, sum hann hevur goldið frælsi okkara við.

*Eitt trúfast hjarta, Harri mín,*
*skal tær til ognar vera,*
*tú frelsti meg, eg eri tín,*
*tí skal eg prís tær bera.*
*Hvør maður sær, tú góður var,*
*tú vára synd á krossi bar,*
*til Guds børn vilt oss gera.*

# Pápi situr við

Nøkur ferðafólk vóru uppi á einum brøttum fjalli og leitaðu eftir blómum. Tá sóu tey nakrar vakrar blómur, sum tey ongantíð høvdu sæð fyrr. Men hesar blómurnar vuksu á eini rók niðri í hamrinum. Skuldu tey fáa tær, mátti ein síga niður á rókina eftir teimum; men tað tordi ongin.

Tá sóu tey ein hirðadrong. Tey rópaðu til hansara og søgdu, at hann skuldi fáa góða løn, um hann vildi síga niður á rókina eftir blómunum. Tey skuldu øll sita við, meðan hann var niðri, so honum nýttist ikki at vera bangin.

„Eg vil heldur fara eftir pápa, so at hann kann sita við," segði smádrongurin og skundaði sær oman eftir pápa sínum. Pápin kom við eini sterkari línu, og drongurin fór óttaleysur niður eftir blómunum, og hann fekk góða løn.

„Men – hví tordi tú ikki at líta á okkum?" spurdi ein ferðamaður. „Hetta høvdu vit dugað líka væl sum pápi tín."

„Eg kenni tykkum ikki," svaraði smádrongurin, „men pápa kenni eg, og tá ið hann situr við, so eri eg ikki bangin."

\- - -

Soleiðis er eisini við himmalska pápa okkara og okkum.Vit koma í trupulleikar og vanda í jarðarlívi okkara, kanska serliga, tá ið vit skulu hjálpa øðrum menniskjum. Tá er trygt og gott at vita – *at pápi situr við.*"

*t*. týddi.

# Hansara einsemi grøddi okkara einsemi

Hóast tað mangan vóru stórar mannamúgvur rundan um Jesus, var hann viðhvørt einsamallur. Og enntá teir seinastu tímarnar av lívinum var ongin hjá honum. „Tá fóru allir lærusveinarnir frá honum og rýmdu.“(Jóh. 26,56). Mannfjøldin, sum fyrr í somu vikuna hevði rópt: „Hosianna,“ fór nú at rópa „krossfest hann, krossfest hann!“ Hann var púra einsamallur (Matt.21,9; Luk.23,21).

At enda rópti hann av krossinum: „Gud mín, Gud mín, hví fórt tú frá mær?“ Har hann hekk á krossinum, er Kristus tað einsamallasta menniskjað, sum nakrantíð hevur livað. Hví? Tí at hann bar tínar og mínar syndir við sær upp á krossin, og Gud vil ikki síggja synd. Fyri tína og mína skuld helt Jesus hesar ræðuleikarnar út, sum dómur okkara var. „So nógv elskaði Gud okkum...“

Gjøgnum deyða sín gjørdi Kristus okkurt við høvuðsorsøkina til einsemi okkara: **skilnaðin frá Gudi.** Av krossinum rættir hann tær og mær hond sína...

Tær nýtist aldri longur at vera einsamallur. Ein stund saman við Kristi kann fylla tómrúmið í lívi tínum og geva tær nakað, sum tú kanst liva uppá. Kennir tú Kristus?

*Ein borg mær hann er, har eg hvíla nú kann*
*sum skip í tí tryggastu havn;*
*hjá Jesusi eina mín sál hvílu fann,*
*mín friður er hansara navn,*
*hann sjálvur meg tók í sín favn.*

---

Frá Jesusi fáa vit: *1.* Lív - *2.* Streymar av lívi - *3.* Lív í yvirflóð - *4.* Ævigt lív.

*e.c.* ums.

---

„Tann, sum ikki trýr, skal glatast,” stendur í Bíbliuni. Fólk mugu fáa eyguni upp fyri tí, áðrenn tað er ov seint, tí vit eru her upp á lænta tíð, og menniskju kunnu óvæntað verða rivin burtur.

*e.c.* ums.

# Jesus, lívsins vatn

Vit hava ein likamligan tørv á vatni; men okkum tørvar eisini andligt vatn. Jesus segði, at vatnið, sum hann vil geva okkum, „skal verða í okkum ein kelda av vatni, sum vellir fram til ævigt lív.“ (Jóh.4,14)

Gud segði: „Tí at tvær ringar gerðir hevur fólk mítt gjørt: Meg, lindina við livandi vatni, søgdu teir burtur og høgdu sær brunnar við sprungum, ið ikki halda vatni.“ (Jer. 2,13). Bíblian sigur, at fólk, sum ikki hava andligt vatn, eru „eins og eik við følnaðum leyvi... eins og vatnleys viðarlund.“ (Jes.1,30).

Trot er á andligum vatni um allan heim. Fólk tysta eftir andligum vatni. Vit lesa um tað í avísunum. Vit síggja, at fólk leita til rivnaðar brunnar í jagstran síni eftir onkrum, sum bara lívsins vatn kann geva teimum. Mong menniskju leita eftir onkrum, sum tey halda kann stilla tostan, men vita ikki sjálvi hvørjum. Men ta innastu tráan í sálardýpinum **kann bara ein stilla, JESUS KRISTUS.**

*Dýrgrip veit eg ein, og vert at leita*
*eftir hesum gripi víst tað er;*
*tann, ið fann hann, alt vil fegin tveita*
*og bert ognast hann í hesi verð.*

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. mars | Tekstur: | Matt. 7,24-27; | bíbliuorð: | Matt. 7,24 |
| 12. mars | Tekstur: | Luk. 15,4-7; | bíbliuorð: | Jóh. 10,11. |
| 19. mars | Tekstur: | Matt. 22,1-14; | bíbliuorð: | Matt. 22,4 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 6* **19. mars 2017** *77. árg.*

# Tá ið emaljan dettur av

Øll, sum hava livað við bakinum vendum móti Jesusi, og so hava vent andlitinum móti honum, hava upplivað okkurt gátuført. Ein maður fortelur, at hann hevði hoyrt um ein ungan mann, at hann dagin eftir umvending sína sá húsini og vegirnar og fjørðin í eini gyltari glæmu. Og tá ið maðurin, sum fortelur hetta, fyri nøkrum árum síðani hitti henda sama mannin og spyr hann, hvussu tað var við hasum, váttaði hann við einum smíli, at hatta passaði.

Ein maður í Afrika fortelur, at hann merkti eitt frískt lot í sinninum. Og vit hoyra um menniskju, sum hava fingið eina aðra lívsáskoðan, eftir at tey hava vent sær til Jesus Kristus, og hóast tað hjá mongum gongur ein tíð, áðrenn tryggleikin og gleðin fáa fastatøkur, fara tey flestu, sum geva Gudi lív sítt, at merkja nakað av hesum.

Men tað koma dagar eftir hesar. Dagar, sum vit ikki høvdu væntað. Dagar, har vit ikki røkka til, og emaljan flusnar uttanav. Vit kenna okkum brádliga aftur mitt í lívsins gerandisdegi. So hevði allur kristindómur okkara kanska bara verið ein viðfáningur. Øll umvending okkara var helst, tá ið til stykkis kom, bara eitt upplop. Helst høvdu vit bestan hugin eins og Paulus at rópa: ***„Hvør skal bjarga mær frá hesum deyðans likami?“*** Men her eiga vit at vera varin. Tað er nú, ávøksturin byrjar, góðskingin, sum skal leiða okkum víðari fram á veg sum kristin.

Øll, sum fara inn á kristna vegin, fara at uppliva mótgongd. Vit kunna enntá hitta menniskju, sum av røttum kunna siga, at lívsins trupulleikar ikki komu, fyrr enn tey høvdu vent um.

Men kortini vildu tey ikki býta henda nýggja tryggleikan um við gamla lívið í óvissu.

Vit kunnu taka tað, sum eitt kirkjuráð í eini frágreiðing skrivaði um andligu støðuna har í landinum: „Land okkara stendur andlit til andlits við stóru trupulleikarnar av yvirflóðini: „Følsk uppfatan av peningi, ítrótti og materiellum vælstandi hava tikið valdið á tjóðini.“ Hesin veruleikin minnir okkum á, at ***„vælstandur umboðar ein størri vanda enn neyð.“***

Um vit altíð liva á lívsins sólsíðu, kann eitt yvirdrivið sjálvsálit lættliga fáa valdið á okkum. Tí skalt tú hvørki gerast mótfallin ella stúrin, tá ið tú sært annað enn rósur vaksa á lívsleið tíni. Møguleikin fyri andligum vøkstri er at finna í einum og hvørjum trupulleika. Og tá ið tú ert komin ígjøgnum trupulleikan, fert tú sinnisliga at takka. Kann henda, at tú tá fert at taka undir við Paulusi: ***„Tøkk fái Gud við Jesusi Kristi, harra okkara!“***

*Bert sálardeyða*
*bar syndarinnar rót,*
*men blóðið reyða*
*av Kristi beyð mær bót;*
*mítt lív um ævi*
*er Jesu Kristi náð,*
*tí, Harri, havi*
*tú mína lyst og trá,*
*og deyðakavið*
*skal ongantíð eg sjá.*

---

Summi menniskju eru tað, sum norðmenn kalla „vekkelses-turister”. Tey fara yvir til Amerika, har tað frættist, at stór veking er, so í einum býi og so í einum øðrum. Tað er vandamikið at seta sítt álit á menniskju. Nei, renn ikki aftan á menniskjum, men møt Harranum í Orðinum hvønn dag. Et teg mettan hvønn dag í Orðinum, tanla og tygg tað.

*e.c.* ums.

---

„Tann meinigheitin, sum ikki evangeliserar, storknar til eina steinrenning,” segði kendi trúboðarin Oswald J. Smith, „og eingin hevur rætt at hoyra evangeliið tvær ferðir, tá ið tað enn eru summi, sum ongantíð hava hoyrt tað.” Gud hevði eina áheitan á Jósva - eina áheitan, sum eisini er ætlað tær og mær: „Almikið er enn eftir av landinum at hertaka.” Jós. 13,1.

*e.c.* ums.

# Vegurin

*Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Ongin kemur til faðirin uttan við mær. Jóh. 14,6.*

Mangir vegir, men bara ein sannur vegur – mong orð og lítil sannleiki, nógv eiti og lítil veruleiki manna millum, tí at Kristus er so lítil fyri teimum. Vit vilja ikki standa einsamøll í Kristi av ótta fyri, at vit mugu ganga í honum – tann vegin, sum hann sjálvur er, og sum hann sjálvur hevur gingið.

Vit læra orðini og grípa ikki sannleikan. Vit tala um sannleikan, men ganga ikki í sannleikanum. Vit vilja hava Krist á tunguni til troystar, men ikki sum okkara lív og veru í hjartanum. Hetta er ikki kristindómur!

Og koma vit ikki til faðirin, so ganga vit ikki inn í lívið, tí at vit hava ikki hin sanna vegin, sannleikan og lívið, og standa ikki í honum, og hava ikki lívið í okkum, men bara á tunguni og ímynda okkum tað. Ein ímyndað ferð, ein ótroddur vegur bera ikki á mál.

Er Kristus vegur tín, so *gakk* hann, annars kemur tú ikki longur saman við honum. Er Kristus sannleiki tín, lat hann so loysa teg frá syndini, tí tað megnar hann, tað vil hann, tað má hann, annars ert tú ikki loystur og kemur ikki til faðirin.

Er Kristus lív títt, má hann liva í tær og tú í honum – annars ert tú livandi deyður og sært ikki faðirin. Gríp tí hitt æviga lívið og gakk sannleikans veg, og eftir hesum vegi saman við Jesusi kemur tú til faðirin.

*t.* týddi.

# Fylgja Jesusi

Jesus sigur: „Fylgið mær eftir, so vil eg gera tykkum til mannafiskarar." Matt. 4,19.

Besta og týðiligasta tekinið uppá, at tað av sonnum er Jesusi, vit fylgja, er, at vit eru mannafiskarar. Sambært Jesusi er tað hesum spori, vit skulu halda okkum í allan vegin, og Hann er tann, sum ger okkum til mannafiskarar.

*E. Campbell* umsetti.

# Salt jarðarinnar

*Tit eru salt jarðarinnar; men um saltið dovnar, hvørjum skal tað tá verða saltað við? Tað dugir onki longur uttan at verða blakað út og traðkað undir mannafótum. Matt. 5,13.*

Við kristnilívinum fylgja bæði gávur og uppgávur, og tað er bara við at taka ímóti gávunum frá Gudi, at vit kunnu fremja uppgávuna millum menniskju. Ein av teimum týdningarmestu uppgávunum er at vera salt. Saltið hevur fyrst og fremst tann eginleikan, at tað verjir tað óspilt, sum tað kemur saman við. Tað heldur skaðiligari ávirkan burturi og verjir móti roti.

Rætt er tað, at hvussu lítið vit halda, at kristindómurin setir dám á heimin, so hevði heimurin rotnað, um hitt kristna saltið ikki virkaði so gjøgnumtreingjandi, sum tað ger. Men tá ið saltið kemur í sár, so svíður í. Tí hatar heimurin okkum. Harumframt virkar saltið so leskandi og gevur smakk.

*t.* týddi.

---

Tá ið ein russiskur austronautur kom niður aftur á jørðina, segði hann: „Eg havi verið úti í rúmdini. Tað er eingin Gud." Tá reistist Gud úr sæti og segði: „Tað er eingin kommunisma!" Og so fall kommunisman!

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 19. mars | Tekstur: Matt. 22,1-14; | bíbliuorð: Matt. 22,4 |
| 26. mars | Tekstur: Luk. 15,11-32; | bíbliuorð: Jóh. 6,37b |
| 2. apríl | Tekstur: Matt. 18,21-35; | bíbliuorð: Matt. 6,12 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74